Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðadeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Fløskubrot, plastikkfløskur og umhvørvislógin

Oddagrein

Í EINI grein í lýsingarblaðnum, sum Sosialurin gav út um vikuskiftið, vísti eitt av blaðfólkunum á tað keðiliga og óhepna við glasfløskum og fløskuknúsi á tjóðarhátíð okkara, ólavsøkuni. Hann hevði grein í sínum máli, og spurningurin um íløt átti at verið tikin upp aftur við atliti til umhvørvislógina.

TAÐ skerst ikki burtur, at víða hvar – í bygd og í bý, í fjøru og haga – eru fløskubrot ein umhvørvisskemd. Vit kunnu taka eina fulla fløsku út við okkum, men vit – ella nøkur av okkum – tíma ikki at taka eina tømda og lætta fløsku heim við aftur, hóast tað skuldi verið nógv lagaligari at koyrt hana í lumman ella í skjáttuna.

HETTA er partvíst ein spurningur um hugburð hjá tí einstaka og partvíst er tað ein spurningur, hvønn politikk, vit reka á hesum øki. Sjálvandi átti hvør einstakur av okkum at tikið tað, sum er tikið út ella keypt á vegnum, heimaftur ella koyrt tað í eitt ruskílat. Men so er ikki í nógvum førum.

ORSØKIRNAR eru fleiri. Ein er, at pantið, sum latið verður fyri fløskur, er í so lítið til at fólk altíð lata fløskurnar inn aftur. Tí átti pantið at verið hægri – so mikið høgt, at tað gjørdi mun. Ein onnur orsøk er, at ruskíløtini eru ov fá, bæði í bygdum og í býum, á almennum plássum og í teimum mest vanligu ferðingarplássum í náttúruni. Ein triðja orsøk er so hugburðurin, sum nevndur er omanfyri.

HARAFTURAT kemur spurningurin, um tað er neyðugt í heila tikið at hava glasfløskur í dag. Tað eru jú serliga tær, sum eru til ampa og skaða. Meginparturin av sodavatni verður í dag selt í plastikkfløskum, og vit kunnu keypa bæði útlendskt og føroyskt øl í plastikkfløskum. Tað eru ikki fleiri tómar fløskur at síggja, síðani øl fekst í plastikkfløskum, og pant fæst eisini fyri tær. Tí átti plastikkfløslur kanska at verið ein gongd leið, samstundis sum pantið varð hækkað.

TÁ »stubby-fløskurnar« vórðu bannaðar fyrst í sjeytiárunum, tí tær kundu ikki latast inn og vóru ein umhvørvisskemd, varð eisini bannað at flyta inn øl og sodavatn í dunkum. Í grannalondum okkara verður nógv øl selt í dunkum, men ongastaðni síggjast dunkar í náttúruni, á strondum ella øðrum savningarstøðum, hvørki í Skotlandi, Íslandi ella í Danmark. Har nógv verður selt í dunkum, sum jú er eitt vinarligt og lætt ílat.

EINKI verður broytt til á ólavsøku, men vit kunnu minna á at leggja teimum ungu í geyma, um ikki at blaka fløskur og annað rusk frá okkum á alfaravegi og í vøkru náttúru okkara.

Sosialurin

Mælir til grindasafari

JUSTINUS LEIVSSON
EIDESGAARD

Býráðslimir í Havn fáa skriv frá útlendingum, sum harmast, at føroyingar halda fram við grindadrápi.

Í einum telduposti til Elin Lindenskov, býráðslim í Havn, skrivar hálendingurin Cor van de Water, at føroyingar skuldu heldur skipað fyri grindasafari, har ferðafólk kundu uppliva ríka djóralívið við Føroyar, heldur enn at vit á barbariskan hátt týna hetta.

Cor van de Water skrivar, at vanliga so hevur hann virðing fyri, at fólk eru ymisk og at tey liva ymiskt. Øll hava sín hátt at halda sær á gamni, alt eftir hvørju mentan tey koma frá.

„Men eg kann ikki góðtaka, at djór verða torturerað bara fyri at fólk skulu hava tað stuttligt. Tit eiga mína virðing, um tit finna ein annan hátt at stuttleika tykkum.

Hann mælir til, at føroyska ferðavinnan heldur fer at gera nakað burturúr grindahvalinum, soleiðis at ferðafólk kunnu njóta hann livandi. Her er peningur at vinna.

Ólavsøkurenningin verður hósdagin

Sum vant skipar Bragdið fyri Ólavsøkurenning. Renningin verður sum síðsta ár skipað í 6 bólkum 1. og 2. bólkur eru dreingir og gentur sum eru fødd í 91 ella seinni. 3. og 4. bólkur eru dreingir og gentur fødd 87 - 90. 5. og 6. bólkur eru menn og kvinnur.

Renningin flutt

Orsakað av nógva virkseminum á Eystaru bryggju hóskvøld, lossing o.a. verður renningin flutt frá Eystaru Bryggju til P.-økið á Skálatrøð. Tíverri vóru fyrireikarnir ikki varugir við hetta fyrr enn Ólavsøkuskráin var farin til prentingar. Tí stendur í skránni at renningin byrjar og endar við Farstøðina, men sun nevnt verður byrjað og endað á P-økinum á Skálatrød.

Ólavsøkurenningin í fjør

Í fjør var luttøkan metstór, 160 rennarar ílat. Bólk 1, dreingir 9 ár, vann Øssur Debes Eiriksfoss úr Bragdinum, har vóru 52 luttakarar. Bólk 2, gentur 9 ár, vann Jenny Svaboe úr Miðvági, har vóru 29 luttakarar. Bólk 3, dreingir 13 ár, vann Olaf Berg úr Havn, har vóru 24 luttakarar. Bólk 4, gentur 13 ár, vann Helga Djurhuus, úr Havn, har vóru 13 lutakarar. Bólk 5, menn, vann Guttorm Sørensen úr Treystinum, har vóru 32 luttakarar. Bólk 6, kvinnur, vann Sunnuvá Bjarnastein, úr Bragdinum. 10 kvinnur luttóku í fjør.

Grand prix renningin 2000

Ólavsøkurenningin er samstundis síðsta umfar av Grand Prix renningini í ár. Spenningurin er stórur bæði hjá kvinnum og monnum, hjá kvinnum stendur kappingin millum Sunnuvu Bjarnastein og Rigmor N. Joensen, hjá monnunum er kappingin millum Boga Lenvig og Guttorm Sørensen. Somuleiðis eru bæði liðini hjá Bragdinum so at siga jøvn í liðkappingini áðrenn síðstu kapping.

Tilmelding á staðnum

Bragdið endar við at boða frá at renningin er fyri øll, stór sum smá, og minnir á at tilmelding er á staðnum kl. 18.00 og byrjað verður at renna kl 18.30 27. juli.

Δ

Til minnis um
Anniku Gulklett

Góða Annika,

Vit kendust úr Hoydølum, har tú gekk ein klassa undir mær, og eisini sambandið til Nólsoyar gjørdi, at eg kendi teg uppaftur betur. Vit plagdu altíð at práta á veg inn til Havnar ella út til Nólsoyar.

Tú vart ein persónur, sum man støðgaði á og gav sær stundir at tosa við, ein persónur mær veruliga dámdi at tosa við, eg kendi, at tú skilti teir tankar og kenslur, ið lógu aftan fyri samrøðuna; tankar og kenslur, ið stungu djúpari enn tað vanliga „hvussu gongur?“ - „fínt og hjá tær....“ Djúpari enn eitt forhastað SMS prát. Eg sakni teg, títt blíða andlit og gevandi lyndi ómetaliga nógv.

Tað er so undarligt at hugsa sær...leygarkvøldið, tann lagnudag, sat eg á helluni í gomlu Hoyvíkini og hugsaði um framtíðina, hvussu alt skuldi verða, og um hvat eg skuldi gera, tá summarið var av... eg hugdi út á víkina, niður í taran og læt tankarnar ferðast frítt. Ein tjaldursgrælingur gekk so friðarligur niðri við sjóvarmálan og hugdi at mær, hesum heldur ókenda gesti. Sólin skein, men lotið var kalt.

Tað er løgið at vita, at beint undir mær lá tú Annika og hvíldi. Eisini tú hevði leitað tær niðan, ikki fyri at lata tankarnar ferðast ella hugsa um, hvat skuldi henda í morgin, tí tað visti tú longu frammanundan. Nei, tú hevði funnið friðin á havsins botni...og friður veri við tær tú lívsins blóma.

Góðu Jens Kjeld og Marita, nú sita tit so eina eftir við minninum um dóttur tykkara Anniku, henda lívsins blóma við rótum so djúpum. Tó er eitt sum eingin kann taka frá tykkum, og tað eru tey fræ, sum hon so væl og virðiliga sáddi, meðan hon var millum okkum, goymið tey væl, síggið tey vaksa og festa røtur, og gleðist um allar tær lívsins blómur, sum halda á at vaksa so leingi sum vit liva.... Jesus verði hjá tykkum.

Við djúpari samkenslu og tøkk

Birita

P.S her er ein kvøða til tín og verðina, bygt á ørindi, sum abbi tín plagdi at taka til:

„Til Anniku og Verðina“
Eygu mega glitra
og muðurin hann lær
hylur tað, ið eingin sær

Blómur mega grógva
Og sólin víða sær
Undir døkku mold ei nakar nær

Við lívsins strond tað leikar hart
og væna rósan strongd man kenna
í næstrans eyga alt so fjart
teim neyðarróp tá ei upprenna

BN

Stjørnur mega skína
og mánin tykjast nær
á havsins botni ljós so fjar

Útvarpið víða um á Ólavsøku

-Okkara skylda er eisini at gera Ólavsøku fyri tey, íð ikki eru á Ólavsøku, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri

JÚSTINUS LEIVSSON
EIDESGAARD

Í dag dugir valla nakar at ímynda sær eina Ólavsøku uttan at útvarpslurtið er ein partur av henni, ein stórur partur og Ólavsøkan er eisini ein stór avbjóðing hjá útvarpsmanningini. Fleri beinleiðis frásagnir og sendingar vera og aftur í ár er verður Parnassið á Hotel Hafnia karmurin um prát og tónleik. Sent verður beinleiðis í hjartanum á Ólavsøkuni, oman og niðan eftir Áarvegnum.

-Vit fara at senda um alla ólavsøkuna. Vit byrja longu um morgunin ólavsøkuaftan við ymiskum tilfari, sum hevur við ólavsøkuna at gera. Frá klokkan 11.00 til 12.00 verður ein barnasending og aftan á døgurða fram til kappróðurin klokkan 15.00 verða ymiskar meira seriøsar sendingar, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

- Ein av okkara medarbeiðarum hevur funnið fram til eina ólavsøkusending, sum danska útvarpið gjørdi í 1955. Hann hevur leitað í savninum hjá danska útvarpinum. Í hesi sendingini fáa vit fáa vit eitt sindur av stemmninginum frá Ólavsøku fyri 45 árum síðan, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

Ólavsøkudag verður sent beinleiðis frá gudstænastuni í Dómkirkjuni, frá skrúðgonguni og frá tingfundinum klokkan 13.00. Seinnapartin verður sent beinleiðis frá fólbólti.

Í sambandi við Ólavsøkuna gevur útvarpið í ár út eina fløgu við kendum slagarum frá sekstiárunum, sum útvarpið hevur verið við at framleitt. Har verða fleiri kendir, eitt nú „Kenna tit Rassmus.“ Tað eru okkara fremstu tónleikarar, sum hava skipað fyri.

Fútin stevnt Watson

Fútin, M. Nepper Christensen, hevur stevt Paul Franklin Watson, tí hesin ikki hevur góðtikið tvey sektaruppskot fyri brot á føroyska lóg. Tað eina sektaruppskotið er upp á 50.000 krónur og hitt er upp á 100.000 krónur. Fútin veit ikki at siga, nær málini koma fyri í rættinum.

je

Watson uttanfyri markið

„Ocean Warrior“ liggur beint uttanfyri tríggjar fjórðingar og bíðar eftir grind. Í gjár var hann staddur eystanfyri og mánadagin vóru tveir hálendskir journalistar, sum eru við Watson í landi í Havn. Watson segði við The Guardian í seinastu viku, at hann fer at vera undir Føroyum næstu mánaðarnar, fyri einaferð med alla at steðga føroyska grindadrápinum.

je

Møtir, kovboyhattar og gott lag á skíggjan

Karmurin um sendingarnar hjá okkum á Ólavsøku verður miðbýurin og vit fara at práta beinleiðis við vælhýrdar ólavsøkugestir, sigur Øssur Winthereig, tíðindastjóri í Sjónvarp Føroya

JÚSTINUM LEIVSSON
EIDESGAARD

Sjónvarpið er reint tekniskt eitt sindur tyngri miðil at arbeiða við enn útvarpið og sjónvarpið hevur á ólavsøku funnið tvey pláss í miðbýnum, har ein fittur partur av virkseminum fer at ganga fyri seg.

- Vit hava innrættað eitt upptøkuhøli í ovaru hæddini hjá P/F Thomas Dam. Her fara vit at gera prát við fólk. Vit hava eisini gjørt brúk av broytingunum í miðbýnum og vit fara at senda beinleiðis úr garðinum hjá G, beint aftanfyri Sparikassan. Har verður í løtuni gjørt eitt sokallað amfieteatur. sigur Øssur Wintereig, tíðindastjóri í SvF.

- Vit fara at senda úr garðinum hjá G frá klokkan 19.00 til 21.30 og vit eru spentir upp á hetta. Tað skuldi borið til at fingið stemmingin á Ólavsøku við. Um hetta mundi vera eisini tvey møti, eitt niðri við Bókhandilin og eitt uttanfyri Ebenezer. Her verður eitt sindur av hvørjum, sangi, gestum, kovboyhattum og so víðari, sigur Øssur Winthereig.

- Vit fara at brúka alt krútið ólavsøkuaftan og slakka eitt sindur av Ólavsøkudag. Eini 15-20 fólk vera til arbeiðis. Vit fara eisini at senda frá kappróðri og øðrum ítrótti, men hetta verður ikki beinleiðs, heldur sum innsløg. Nýggjar upptøkur av føroyskum dansi verða eisini at síggja í sjónvarpinum á ólavsøku, sigur Øssur Winthereig.

Shetland Cruise 2000 sumarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag
Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30
Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu
Gisting á hotelli — (í lágarstíð) er einans ... 864,- fyri hvønn
Gisting á vallaraheimi — (í lágarstíð) er einans ... 691,- fyri hvønn
Privat gisting — (í lágarstíð) er einans ... 819,- fyri hvønn
Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.
Ring og hoyr nærri !
e-mail: booking@smyril-line.fo

gult cyan magenta svart